


Vágs Kommuna

## Broyting í almennu byggisamtyktini

Sambært grein 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum, verður við hesum gjørt kunnugt, at Vágs Býráð á fundi 19. juni 2007 samtykti at broyta byggisamtyktina fyri Vágs kommunu soleiðis:

Bústaðarøkið B1 verður víðkað við 46105 m$^2$.

»Sandurin« sum nú hoyrir undir H1 øki ið er friðað øki, kemur undir C10 øki ið er eitt øki til alm. endamál.

H1-økið minkar við 12150 m$^2$ og C10-øki verður víðkað við 12150 m$^2$.

Tilfar sum vísir broytingarnar liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá fríggjadegnum 20/7 2007 til fríggjadagin 10/8 2007 í vanligari avgreiðslutíð.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at lata Vágs Kommunu skrivliga í seinasta lagi 19/10 2007.

**Vágs Kommuna**
Vágsvegur 22
900 Vágur

Fjarskiftis Eftirlitið
Telecommunications Authority

## Summarfrí

Vegna summarfrí verður stongt frá fríggjadegi 20. juli 2007.
Opið verður aftur mánadagin 6. august 2007.
Um átrokandi ørindi eru í hesum tíðarskeiði ber til at ringja á tlf. nr. 35 60 43 millum kl. 08:00 – 16:00 tó fr. 08:00 – 15:00.
Vit ynskja øllum eina góða summarfrítíð

***Fjarskiftiseftirlitið, Tryggingareftirlitið, Posteftirlitið og Kappingarráðið.***

Internet

Sosialurin
www.sosialurin.fo

## Høli til leigu

Høli – 136 m$^2$ – til leigu í J. Dahlsgøtu 2 í Havn.

**Tlf. 501113**

# Føroya Handilsskúli á Kambsdali søkir eftir TÍMALÆRARUM

Talan er um tímar í donskum og føroyskum. Samanlagt er talan um eitt fulltíðarstarv.

### Arbeiðsuppgávur

- undirvísa í viðkomandi lærugreinum
- leggja til rættis undirvísingargongdir
- luttaka í toymisarbeiði
- vera við í ráðlegging skúlans
- luttaka í verkætlanum, sum skúlin skipar fyri

### Vit vænta, at tú

- hevur viðkomandi útbúgving á kandidatstigi ella aðra hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan til lærugreinir á A- og B-stigi.
- hevur viðkomandi útbúgving á bachelor-stigi ella aðra hægri útbúgving saman við serfrøðingavitan til lærugreinir á C-stigi.
- hevur áhuga í undirvísing
- dugir væl at samstarva og samskifta
- vilt vera við at menna skúlan
- ikki ræðist nýggjar avbjóðingar

### Vit kunnu m.a. bjóða

- eitt fakligt mennandi umhvørvi
- eftirútbúgvingarmøguleikar
- góðar arbeiðsumstøður
- ein spennandi og lívligan gerandisdag

### Løn

Lærarar verða løntir eftir sáttmála millum Lærarafelag Handilsskúlans og Fíggjarmálaráðið.

### Umsókn

Umsóknin skal stílast til Føroya Handilsskúla og sendast til Føroya Handilsskúla á Kambsdali, 530 Fuglafirði. Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 23. juli 2007

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Páll Isholm, deildarstjóra, á telefon 444900/219930 ella pall.isholm@skulin.fo

**FØROYA HANDILSSKÚLI**

Føroya Handilsskúli á Kambsdali | Kamsdalur | FO-530 Fuglafjørður
Tel. +298 444900 | Faks 444901 | www.fhk.fo | fhk@skulin.fo

Á Føroya Handilsskúla á Kambsdali ganga umleið 240 næmingar. 100 næmingar ganga á FHS, 100 á HH og umleið 40 taka FHS sum fjarlestur. Á skúlanum starvast umleið 30 fólk harav 22 lærarar. Skúlin er partur av Føroya Handilsskúla, ið umframt FHS og HH eisini fyriskipar FHS og HH á kvøldskúla og framhaldsútbúgvingar so sum HD og akademimerkonom.